# ítróttur

Nr. 108 • hósdagur • 10. juni 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo


# So byrjar EM-kappingin

**Heilt nógv fólk hava teknað seg til EM-kappingina hjá Sosialinum og Kiosk Steinatún, og nú byrjar sjálvt tippingin av álvara**

EM-KAPPING
*Jákup Mørk*

Sum lesarin kanska hevur lagt til merkis, so hava tað í seinastu verið fleiri lýsingar, har lesararnir hava havt møguleika at tekna seg til stóra EM-kapping.

Høvuðsvinningurin í hesari er einki minni enn ein fótbóltsferð í Europa eftir egnum ynski, og hartil eru so eisini fleiri aðrir góðir vinningar á skránni.



EM-KAPPINGIN

| 1. UMFAR | | | 1 | X | 2 |
|---|---|---|---|---|---|
| Portugal-Grikkaland | Bólkur A: | 12. juni kl. 17.00 | | | |
| Spania-Russland | Bólkur A: | 12. juni kl. 19.45 | | | |
| Sveis-Kroatia | Bólkur B: | 13. juni kl. 17.00 | | | |
| Frakland-Ongland | Bólkur B: | 13. juni kl. 19.45 | | | |
| Danmark-Italia | Bólkur C: | 14. juni kl. 17.00 | | | |
| Svøríki-Bulgaria | Bólkur C: | 14. juni kl. 19.45 | | | |
| Kekkia-Letland | Bólkur D: | 15. juni kl. 17.00 | | | |
| Týskland-Holland | Bólkur D: | 15. juni kl. 19.45 | | | |
| Grikkaland-Spania | Bólkur A: | 16. juni kl. 17.00 | | | |
| Russland-Portugal | Bólkur A: | 16. juni kl. 19.45 | | | |
| Ongland-Sveis | Bólkur B: | 17. juni kl. 17.00 | | | |
| Kroatia-Frakland | Bólkur B: | 17. juni kl. 19.45 | | | |

*Í blaðnum í dag er fyrsti veddingarseðilin til stóru EM-kappingina*

### Longd freist

Higartil hava hópin av luttakarum teknað seg til kappingina, og hóast upprunaliga freistin fyri tilmelding var úti týsdagin, so hevur arbeiðið við skrásetingini gingið somikið væl, at dyrnar fyri nýggjum tilmeldingum verða hildnar opnar fram til leygardagin.

Men tá er tað so eisini allar seinasta freist, tí seðlar, sum tá ikki eru skrásettir, sleppa heilt einfalt ikki við í kappingina. Hetta kemst sjálvandi av, at tað ber illa til at tekna seg, eftir at fyrstu dystirnir eru leiktir, tí tað vildi í øllum førum givið nakrar fyrimunur, tá gitast skal um úrslitini.

Hjá teimum, sum hava teknað seg til kappingina, ræður nú um at seta krossarnar rætt. Í blaðnum í dag er fyrsti veddingarseðilin til kappingina, har 12 teir fyrstu dystirnir í bólkaspælinum eru listaðir. Her ræður so um at tippa, hvat land fer avstað við sigrinum í einstøku dystunum – ella um talan verður um javnleik – og so er annars bara at vóna, at tíni git vóru tey røttu. Her á blaðnum fara vit so í øllum førum at fylgja við, og tá uppteljingin fyri hvørt umfarið er liðug, fara vit at sýna yvirlit yvir, hvørjir veddarar eru teir fremstu í spælinum.

# Fimleikafundur

**Hósdagin hevur Havnar Fimleikafelag aðalfund. Nevndarval er á skránni, men eisini verður kunnað um ymisk tiltøk, sum nevndin arbeiðir við**

FIMLEIKUR
*tíðindaskriv*

Hósdagin 10. juni kl. 17.00 verður aðalfundur hjá Havnar Fimleikafelag. Fundurin verður hildin úti í høllini á Stórheyggi og er skráin samb. lógum felagsins. Viðmerkjast kann at tað eru eingin stórmál á skránni hesaferð.

Í nevndini ídag sita Anni Kyster Durhuus, formaður, Karina Nattestad, næstformaður, Erla Mikkelsen, kassameistari og Olga Knudsen, skrivari. Tað eru formaðurin og skrivarin sum standa fyri vali og stilla báðar uppaftur.

### Hjálpideildir

Nevndararbeiðið hjá Havnar Fimleikafelag er hátta á tann hátt, at nevndin hevur hjálpideildir afturat sær. Nevnast kunna, limadeild, fimleikadeild, tíðindadeild og stuðladeild. Hesar verða ikki beinleiðis valgdar á aðalfundinum, men skulu kunngerðast her.

Tey sum vóru í hesum deildum í fjør vóru Valborg Joensen, sum tekur sær av øllum viðvíkjandi limagjaldinum, Ása Poulsen sum hevur við rútmuliðini at gera, Guðrun Guðjónsson sum hevur ábyrgdina av Stórkappingarliðunum, Maj Johannesen, sum tekur sær av teimum vaksnu í felagnum, Pætur Niclassen, tekur myndir til øll tiltøkini, sum felagið skipar fyri, Jákup av Skarði, sum hevur við kunningina í felagnum at gera, Elsba Danielsen, Joan Petersen og Gunri Johannesen, sum hava ábyrgd av teimum praktisku tingunum viðv. tiltøkunum og tilseinast Mariann Reinert, sum júst nú hevur fingið ábyrgdina av amboðsliðunum í felagnum.

Um nevndin hevur broytingar hesum viðvíkjandi, skal tað sum sagt kunngerast á aðalfundinum.

### Í summarsteðginum

Hóast fimleikurin er í summarfrí, so hevur felagið nógv jørn í eldinum í løtuni.

Fyrireikingarnar til komandi ár eru í hásæti og brúkar nevndin nógva orku til hesar fyrireikingar.

Nevndin hevur eftirmetingarfundir av árinum í fjør og útfrá hesum, gerðir nevndin saman við deildunum eina verkætlan fyri komandi veturin.

### Leygardagin 24. juli

Eisini skal felagið hava stórt tiltak á gongugøtuni í Havn leygardagin 24. juli. Ætlanin er at hava mat og bommtombula, sølubúð við vaflum, kaffe og te, fiskibrunn, pylsuvogn, og barnakarosell. Eisini fara FM fimleikarar at leypa á airtrack, sum er ein lang mátta full við luft. Ætlanin er eisini at áskoðararnir, skulu sleppa at royna seg, á airtrackinum. Og so fara ung at vísa okkum hvat rørist í dansiverðini millum tey ungu.

# NSÍ ímóti Esbjerg

NSÍ skal spæla sín Intertoto Cup dyst ímóti Esbjerg. Tað varð endaliga sligið fast týsdagin, tá ið lutakast var um tey bæði seinastu plássini í UEFA Cup kappingini.

Her var Esbjerg eitt av feløgunum, sum hevði møguleika at vinna eitt pláss fyri Fair Play, men luturin fall á feløg úr Ukraina og Armenia.

Fyrri dysturin ímillum Esbjerg og NSÍ verður spældur longu 19. juni.

**-ek**

# Italia best í U21

Italska U21 landsliðið hevur víst vegin fyri A-landsliðnum, nú EM í Portugal byrjar leygardagin. EM fyri U21 lið hevur júst verið í Týsklandi, og í finaluni í hesi kapping vann Italia 3-0 á Seriba/Montenegro. Portugal vann bronsuna í kappingini.

**-ek**

# FCK nýggjan spælara

FC Keypmannahavn hevur keypt ein nýggjan verjuspælara, eftir at Martin Albrecthsen varð seldur til Onglands. Nýggi spælarin er 23 ára gamli Dan Thomassen, sum seinastu seks árini hevur spælt í Italia. Hann hevur spælt í felagnum Padova í triðbestu italsku deildini, men hann hevur verið fastur maður á ungdómslandsliðunum hjá Danmark, og har hevur hann spælt væl.

– Eg havi lært sera nógv tey hesi árini í Italia, men nú havi eg brúk fyri einari nýggjari avbjóðing, sigur Dan Thomassen. Hann hevur gjørt trý ára sáttmála við FCK.

**-ek**

# Keisarin trýr upp á Týskland

Tann ofta atfinningarsami og bersøgni Franz Beckenbauer hevur ikki mist vónina um, at týska landsliðið fer at fáa gott úrslit í EM, hóast úrslitini ikki hava verið av teimum bestu seinasta árið.

– Eg rokni við, at Týskland kemur í hálvfinaluna. Rudi Vøller og Michael Skibbe hava áður víst, at teir duga at skapa ein lið, sum klára seg væl í eini slíkari kapping, sigur Beckenbauer.

Týskland er komið í ein sterkan bólk, har landið skal spæla ímóti Hollandi, Kekkia og Letlandi, og sambært eini meiningakanning hjá sjónvarpsrásini ZDF, so hevur vanligi týskarin ikki ein stóra tiltrúgv til týska landsliðið, sum Beckenbauer hevur. 45 av teimum, sum hava svarað, roknað við, at Týskland kemur ikki víðari frá bólkaspælinum í kappingini.

**-ek**

# Virus á svenska liðnum

Ein virus er leys í svensku landsliðsleguni, og higartil eru tríggir spælarar og ein venjari smittaðir. Tað er hálsbruni, sum ger um seg hjá svensku fótbólsspælarunum, men læknin Magnus Forssblad heldur ikki, at tað fer at ávirka svenska spælið undir EM.

– Tað ræðu um at brúka skilið. Spælararnir skulu ikki drekka av dunkunum hjá hvørjum øðrum, og kennir teir seg illa, so skulu teir halda seg eitt sindur burtur frá hinum spælarunum, sigur svenski landsliðslæknin.

**-ek**



# 136 runnu á norðoyastevnu

Aftur í ár varð skipað fyri norðoyastevnurenning. Og sum vant, so var undirtøkan framúr góð. 136 rennarar fullførdu teinarnar, sum kappast varð á, umframt at tað eisini vóru einstøk onnur, ið høvdu teknað seg, men har tað kortini barst frá at taka lut.

Samstundis var hetta annað umfarið í Grand-Prix renningini í ár. Her er støðan annars tann hjá monnunum, at Sam Vang hevur lagt seg á odda við 80 stigum eftir tvær renningar. Á øðrum plássi er Regin Zachariasen, meðan Jonhard Larsen er á triðja plássinum.

Av yvirlitinum niðanfyri framganga annars tíðirnar í ymsu aldursbólkunum á norðoyastevnurenningini.

**-jm***I*



*kki færri enn 136 luttakarar vóru, tá norðoyastevnurenningin var á skránni um vikuskiftið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Úrslit frá norðoyastevnurenningini

**Gentur -7 ár**
**Teinur 660 m**

| nr. | min | sek | fornavn eftirnavn | árg. | felag |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 3 | 13 | Hervør Olsen | 1997 | Klaksvík |
| 2 | 3 | 33 | Marianna G. Eystberg | 1998 | Tórshavn |
| 3 | 3 | 33 | Ninny Olsen | 1997 | Klaksvík |
| 4 | 3 | 39 | Bjørt Olafsdóttir | 1999 | Bragdið |
| 5 | 3 | 44 | Lilja Jacobsen | 1997 | Hvannas. |
| 6 | 3 | 51 | Margit Frímundsdóttir | 1999 | Tórshavn |
| 7 | 3 | 55 | Mikala Mørkøre | 1997 | Klaksvík |
| 8 | 3 | 59 | Sandra Simonsen | 1997 | Viðareiði |
| 9 | 4 | 2 | Paulina Fuglø | 1999 | Norðdepil |
| 10 | 4 | 25 | Rakul F. Christiansen | 1999 | Hvannas. |
| 11 | 4 | 27 | Miriam Bethuelsdóttir | 1999 | Treysti |
| 12 | 4 | 45 | Silje Krarup | 1998 | Tórshavn |
| 13 | 4 | 56 | Signhild Dánjalsdóttir | 2000 | Norðoyri |
| 14 | 5 | 0 | Marin F. Christiansen | 2001 | Hvannas. |

**Dreingir -7 ár**
**Teinur 660 m**

| nr. | min | sek | fornavn eftirnavn | árg. | felag |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 2 | 52 | Betuel Hansen | 1997 | Roysnið |
| 2 | 2 | 55 | Beinir Johannesen | 1997 | Treysti |
| 3 | 2 | 56 | Steingrímur Hallsson | 1997 | Bragdið |
| 4 | 3 | 09 | Poul Kjartan Matras | 1997 | Klaksvík |
| 5 | 3 | 26 | Betuel R. Hansen | 1997 | Roysnið |
| 6 | 3 | 27 | Aron Dahl | 1997 | Klaksvík |
| 7 | 3 | 29 | Hugin Samuelsen | 1998 | Frælsi |
| 8 | 3 | 30 | Jákup B. Andreasen | 1998 | Klaksvík |
| 9 | 3 | 31 | Uni Gregersen | 1998 | Klaksvík |
| 10 | 3 | 32 | Fríði Frímundsson | 1997 | Tórshavn |
| 11 | 3 | 34 | Martin Olsen | 1997 | Klaksvík |
| 12 | 3 | 37 | Eyðun Ranason | 1997 | Klaksvík |
| 13 | 3 | 41 | Magni Weihe | 1998 | Frælsi |
| 14 | 3 | 43 | Jósef Sivertsen | 1997 | Norðdepli |
| 15 | 3 | 44 | Gilli Samuelsen | 1999 | Frælsi |
| 16 | 3 | 54 | Kristian G. Joensen | 1999 | Klaksvík |
| 17 | 4 | 21 | Regin Olsen | 1998 | Klaksvík |
| 18 | 4 | 50 | Vilads Krarup | 2000 | Tórshavn |
| 19 | 5 | 17 | Agnar Christiansen | | Hvannasund |
| 20 | 5 | 42 | Ísak Tróndheim | 2000 | Klaksvík |
| 21 | 0 | 00 | Rókur G. Eystberg | 2002 | Tórshavn |

**Gentur -10 ár**
**Teinur 660 m**

| nr. | min | sek | fornavn eftirnavn | árg. | felag |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 2 | 39 | Guðrið G. Eystberg | 1994 | Tórshavn |
| 2 | 2 | 46 | Bjørk Reynagarð Svabo | 1996 | Frælsi |
| 3 | 2 | 48 | Sissal Skaale | 1994 | Bragdið |
| 4 | 2 | 49 | Jórunn Hansen | 1995 | Roysnið |
| 5 | 2 | 57 | Gunnvá Justinussen | 1995 | Roysnið |
| 6 | 2 | 59 | Ninna Christiansen | 1995 | Hvannas. |
| 7 | 3 | 2 | Ingibjørg Petersen | 1995 | Tórshavn |
| 8 | 3 | 3 | Elin Dahl Hansen | 1996 | Roysnið |
| 9 | 3 | 4 | Gunnrið Joensen | 1994 | Klaksvík |
| 10 | 3 | 10 | Karla Matras | 1994 | Klaksvík |
| 11 | 3 | 12 | Monika Biskopstø | 1994 | Klaksvík |
| 12 | 3 | 16 | Elna Dalsgaard | 1996 | Klaksvík |
| 13 | 3 | 16 | Bjørk Steinberg | 1996 | Klaksvík |
| 14 | 3 | 18 | Anna M. Jógvansdóttir | 1995 | Bragdið |
| 15 | 3 | 18 | Vár Samuelsen | 1996 | Frælsi |
| 16 | 3 | 20 | Ester Sivertsen | 1995 | Norðdepli |
| 17 | 3 | 22 | Anita Gregersen | 1995 | Klaksvík |
| 18 | 3 | 224 | Laila Hansen | 1995 | Bragdið |
| 19 | 3 | 29 | Gunn Joensen | 1996 | Klaksvík |
| 20 | 3 | 48 | Turið Højgaard | 1995 | Klaksvík |
| 21 | 3 | 48 | Milja Skaale | 1996 | Bragdið |
| 22 | 3 | 51 | Karin Fossdalsá | 1996 | Klaksvík |
| 23 | 4 | 7 | Maria Joensen | 1995 | Bragdið |

**Dreingir - 10 ár**

**Teinur 660 m**

| nr. | min | sek | fornavn eftirnavn | árg. | felag |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 2 | 21 | Rúni Seloy | 1994 | Bragdið |
| 2 | 2 | 27 | John Viljam Johannesen | 1995 | Treysti |
| 3 | 2 | 31 | Regin Joensen | 1995 | Bragdið |
| 4 | 2 | 39 | Petur Andreasen | 1994 | Klaksvík |
| 5 | 2 | 41 | Martin Bertholdsen | 1994 | Klaksvík |
| 6 | 2 | 42 | Jákup Andr. Heðinsson | 1995 | Klaksvík |
| 7 | 2 | 45 | Filip Sivertsen | 1994 | Norðdepli |
| 8 | 2 | 51 | Ólavur Joensen | 1996 | Bragdi_ |
| 9 | 2 | 51 | Andrias Olsen | 1994 | Tórshavn |
| 10 | 2 | 52 | Einar Gregersen | 1995 | Klaksvík |
| 11 | 2 | 52 | Tórur Justesen | 1995 | Klaksvík |
| 12 | 2 | 54 | Benjamin Isaksen | 1995 | Klaksvík |
| 13 | 2 | 58 | Kristian M. Rasmussen | 1996 | Klaksvík |
| 14 | 3 | 3 | Eli Johannesen | 1995 | Klaksvík |
| 15 | 3 | 4 | Osvald á Marknagili | 1996 | Treysti |
| 16 | 3 | 5 | Hans Berg Hansen | 1996 | Klaksvík |
| 17 | 3 | 9 | Suni Clementsen | 1995 | Klaksvík |
| 18 | 3 | 15 | Heðin Gregersen | 1996 | Klaksvík |
| 19 | 3 | 19 | Jósvein Joensen | 1996 | Klaksvík |
| 20 | 3 | 49 | Jóhannes Sivertsen | 1994 | Hvannas. |

**Gentur -13 ár**
**Teinur 1320 m**

| nr. | min | sek | fornavn eftirnavn | árg. | felag |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 4 | 42 | Bjørk Herup Olsen | 1991 | Bragdið |
| 2 | 5 | 18 | Sára Olsen | 1991 | Klaksvík |
| 3 | 5 | 24 | Bjørg Seloy | 1992 | Bragdið |
| 4 | 5 | 29 | Gerda Heinesen | 1991 | Klaksvík |
| 5 | 5 | 36 | Kristianna D.Jákupsdóttir | 1991 | Bragdið |
| 6 | 5 | 36 | Rebekka Fuglø | 1993 | Treysti |
| 7 | 5 | 39 | Silja Niclasen | 1993 | Bragdið |
| 8 | 5 | 50 | Rakul Joensen | 1992 | Bragdi_ |
| 9 | 5 | 54 | Vilbjørg Johannesen | 1992 | Treysti |
| 10 | 5 | 59 | Elspa Dahl Hansen | 1992 | Roysnið |
| 11 | 6 | 5 | Una Joensen | 1993 | Klaksvík |
| 12 | 7 | 56 | Barbara Hansen | 1992 | Bragdið |
| 13 | 7 | 58 | Jóhanna Hansdóttir | 1993 | Bragdið |

**Dreingir -13 ár**
**Teinur 1320 m**

| nr. | min | sek | fornavn eftirnavn | árg. | felag |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 4 | ?? | Remi Langgaard | 1991 | Roysnið |
| 2 | 4 | ?? | Jan Elmar Sørensen | 1991 | Treysti |
| 3 | 4 | ?? | Sørmundur Kalsø | 1992 | Klaksvík |
| 4 | 5 | 14 | Sigmund Olsen | 1992 | Hvannas. |
| 5 | 5 | 26 | Høgni Olafsson | 1993 | Bragdið |
| 6 | 5 | 31 | Teitur Fles | 1991 | Klaksvík |
| 7 | 5 | 32 | Gunnar Christiansen | 1992 | Klaksvík |
| 8 | 5 | 33 | Hákun Hansen | 1992 | Bragdið |
| 9 | 5 | 57 | Janus Gudmundsen | 1993 | Frælsi |
| 10 | 6 | 08 | Ragnar Joensen | 1993 | Húsar |
| 11 | 6 | 14 | Hjørtur Búgvason | 1991 | Bragdið |
| 12 | 6 | 47 | Janus Isaksen | 1992 | Hoyvík |

**Gentur -17 ár**
**Teinur 1320 m**

| nr. | min | sek | fornavn eftirnavn | árg. | felag |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 4 | 53 | Jenny Svabo | 1990 | Frælsi |
| 2 | 5 | 38 | Kate Kalsø | 1988 | Treysti |
| 3 | 6 | 27 | Birna Arge | 1989 | Klaksvík |
| 4 | 7 | 12 | Eyðna Dahl | 1987 | Klaksvík |

**Dreingir -17 ár**
**Teinur 1320 m**

| nr. | min | sek | fornavn eftirnavn | árg. | felag |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 4 | ?? | Daniel Djurhuus Rein | 1990 | Bragdið |
| 2 | 4 | ?? | Álvur F. Christiansen | 1989 | Treysti |
| 3 | 4 | ?? | Hjalti Heðinsson | 1990 | Klaksvík |

**Menn**
**Teinur 5 km**

| nr. | min | sek | fornavn eftirnavn | árg. | felag |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 16 | 36 | Sam Vang | 1970 | Bragdið |
| 2 | 16 | 39 | Regin Zachariasen | 1960 | Bragdið |
| 3 | 16 | 46 | Jonhard Larsen | 1966 | Treysti |
| 4 | 17 | 10 | Guttorm Sørensen | 1968 | Treysti |
| 5 | 17 | 23 | Sigurð B. Justinussen | 1967 | Bragdið |
| 6 | 17 | 24 | Cecil Weihe | 1965 | Bragdið |
| 7 | 18 | 08 | Súni Jacobsen | 1967 | Bragdið |
| 8 | 18 | 12 | Trygvi Hansen | 1966 | Bragdið |
| 9 | 18 | 21 | Jens S. Sørensen | - | Triton |
| 10 | 18 | 31 | Jósvein Herup Olsen | 1958 | Bragdið |
| 11 | 18 | 45 | Jónálvur Johannesen | 1974 | Kollafj. |
| 12 | 18 | 50 | Dorian Petersen | 1968 | Bragdið |
| 13 | 19 | 2 | Regin Johannesen | 1986 | Klaksvík |
| 14 | 19 | 3 | Hans Petur Weihe | 1967 | Frælsi |
| 15 | 19 | 13 | Borgar Biskopstø | 1962 | Treysti |
| 16 | 19 | 36 | Henry Olsen | 1964 | Tórshavn |
| 17 | 19 | 51 | Sølvi Reinert Hansen | 1970 | Roysnið |
| 18 | 20 | 12 | Steindor Hjaltalin | 1949 | Bragdið |
| 19 | 20 | 43 | Tummas Joensen | 1956 | Treysti |
| 20 | 21 | 15 | Robert Vilhelmsen | 1951 | Bragdið |
| 21 | 22 | 2 | Krisjan Christiansen | 1952 | Bragdið |
| 22 | 22 | 13 | Símun Joensen | 1961 | Tórshavn |
| 23 | 22 | 42 | Ólavur Kjølbro | 1977 | Treysti |
| 24 | 23 | 3 | Jacob Hansen | 1987 | Aalborg |
| 25 | 23 | 6 | Hans Birgir Hansen | 1949 | Bragdið |
| 26 | 25 | 10 | Regin Jóanesarson | 1945 | Vestmanna |


VARPIÐ
Skráir og ummælir
16 síður
Hvønn fríggjadag
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá
TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network
Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel
Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2